




# Føroyingar fagn

**Nógv fólk – onkur metti 1000, onkur annar eini 1500 – møttust leygardagin við Sjónleikarhúsið í Havn fyri at fagna føroyskum fjølbroytni, virðing og tolsemi**

*Theodor E. D. Olsen*
*Myndir: Álvur Haraldesen*

Við trummuleikarum á odda varð gingið oman í Steinatún, har Páll Danielsen segði nøkur orð, sum fekk fólk at hugsa um, at øll eru ikki líka. Síðani varð farið oman eftir mentanargøtuni í Havn, Tórsgøtu, nú gongugøtan er stongd og fær nýggjar flísar. Á Vaglinum var sokallað talukór, felagssangur og ymisk tiltøk, ið fekk fólk at hugsa um líkleika og munir okkara millum.

Tiltakið var skipað sum eitt stuttligt og litríkt innslag í føroyska fólkaræðið, og hýrurin var góður í miðbýnum hendan dagin. Fólk vóru biðin um at taka í hondina í hvørjum øðrum, og tað hendi meira enn so, at fjøldin aktaði boðini, tá frásøgufólkið eisini heitti á fundarfólkið um at geva hvørjum eitt klemm. Í øllum førum varð høvuðsrøðarin








Karin Kjølbro:

# – Her er so nógv herligt í Føroy

Gott Føroya fólk.



*Karin Kjølbro var høvuðsrøðari leygardagin. Vit prenta her røðu hennara*

Skjótasti vegur millum tvey menniskju er eitt smíl. Men leiðin kann vera drúgv og illgongd. At byggja brúgv millum einstaklingar og bólkar í sama lítla landi við ymiskum sjónarmiðum, kann vera trupult. Tað krevur hepna hond og endurnýgging av amboðum. Nøkur vanlig fólk – nakrar grasrøtur hava valt at gera tað við at fagna margfeldinum og tí fjølbroytta, og geva okkum eina hugfarsliga løtu saman her í dag. Takk fái tey og vælkomin øll.

Eg eri ósamdur í øllum, tú sigur, men eg vil til mín deyð verja tín rætt til at siga tað. Hesi kendu orð eigur Voltaire, ið livdi í 1700-talinum, og sum stríddist ímóti tvørrandi tolsemi í landi sínum Fraklandi.

Seinastu árini eru vit vorðin óloysiliga bundin at altjóðasamfelagnum. Virðing fyri sjónarmiðunum hjá øðrum og øðrvísi hugsandi er lyklaorðið fyri at sleppa uppí.

Tað er eisini mikil vinningur, um vit læra okkum at mýkja og brýna okkum, læra at hugsa og orða okkum. Tað kann vera lívsneyðugt, áðrenn vit gáa um tað. Og ikki ber til at tiga við afturvirkandi megi.

Hetta hevur skund, tí broytingar henda við rúkandi ferða altjóðapallinum, og í mongum førum – eisini her hjá okkum. Tað tykist, sum tað var í gjár, at dámligi italiumaðurin Gianfrango, ið gjørdi italsk-føroysku orðabókina, varð útvístur úr Føroyum. Og longu nú sóknast løgmaður júst eftir fólki sum honum, tá hann í røðu til landsins leiðarar í farnu viku segði: Skulu vit røkka málinum, hava vit brúk fyri øllum fólkum. Kvinnum og monnum, hvítum og svørtum, samkyndum og hinkyndum, ungum og gomlum.

Virðing fyri sjónarmiðum annara er ikki bert alneyðug globalt. Tað er eins týdningarmikið og avgerandi lokalt millum flokkar, og í flokkum, í felagsskapum og millum menniskju.

Oyggjabúgvar eru tiltiknir fyri at vera individualistar.

Teigurin í stólinum er yndisteigur hjá blaði, ið hvørja viku kemur í hvørt hús. Mong sera ymisklig fólk skulu m.a. svara:

Hvat er størsta hóttan móti heimsfriðinum? Og hvørjum søguligum persóni vildi tú fegin møtt? Svarini hjá øllum bera á sama borðið.

Fundamentalisma, Fanatisma (trábeitni) og intoleransa svara tey flestu til 1. spurning, og 2. spurningur er næstan uttan undantak svaraður við: Nelson Mandela, Móðir Theresa, Mahatma Gandhi ella líknandi persónum.

Ongin Gallupkanning, men hetta sigur nógv. Størsta hóttanin er tvørrandi tolsemi og virðing fyri øðrvísi hugsandi. Og mest hugtakandi menniskju eru tey, ið tala virðing og frið, mildni og hjálpsemi millum menniskju, og sum hava empatiskan førleika – nevniliga evni at duga at seta seg inn í støðuna hjá øðrum. Her skal ikki gloymast, at øll vóru trúgvandi í tí andaliga heimi, tey vóru borin inn í, og at henda trúgv ikki var forðing fyri teirra víðskygni og tolsemi. Tey vóru í praksis ímyndin av mannarættindum og næstrakærleika.

Teigurin í stólinum er partur av okkara søgu og mentan, og eg loyvi mær at halda, at hetta sigur rættiliga nógv, og at vón er fyri okkum sum eitt fólk.

Føroyar eru fyri øll, og demokratiið tryggjar øllum trúarfrælsi. Tað merkir, at øll eiga rætt til at útinna sína trúgv á tann hátt, tey vilja. Guðstrúgvin er grundarlagið undir samfelagnum og hevur verið tað í 1000 ár. Tað er partur av okkara samleika, okkara mentan og okkara fólkaræði. Í einum vælvirkandi fólkaræði hava vit eisini virðing fyri sjónarmiðum annara. Herí er eisini ein ábyrgd, og í ábyrgdini liggur, at tú ikki niðrar tey virði, ið onnur hava kær.

Veit ikki, men eg man vera millum tey heilt fáu, sum beinleiðis havi hitt og tosað við nærum hvønn einasta av teimum, ið dømd eru fyri álvarsom revsilógarbrot í landi okkara seinasta 30 árini. Samanborið við tey 300, ið dagliga royna at hyggja at barnaporno á alnótini, eru tey sera fáment. Taka vit tey burturúr, ið dømd eru fyri kynsligan kriminalitet, so er einamest talan um hinkyndar menn. Nevni hetta, tí tað er viðkomandi í tí kjaki, ið er. Í 1988 var bert ein atkvøða á tingi – tað var mín – fyri at tryggja teim samkyndu móti mismuni.

Seinasta viðgerðin vísti, at tað nærum er løgst ein atkvøða aftrat fyri hvørt árið.

Loyvi mær at leggja aftr-